

## Blackpool á uppflytingarplássi

Hóast tað bert gjørdist til javnleik um vikuskiftið, togaði Blackpool við Claus Bech Jørgensen í hópinum seg upp á uppflytingarpláss í triðbestu ensku deildini. 26 lið spæla við í League One. Tvey tey fremstu liðini flyta beinleiðis upp í næstbestu deildini, meðan fýra tey næstu liðini spæla um eitt uppflytingarpláss. Blackpool spældi ímóti Brighton leygardagin, og dysturin endaði málleysur. Nú liggur Blackpool sum nummar 6, men 10 dystir eru eftir at spæla í kappingini.

## Meira enn ein milliard til Barcelona

Spanska fótbóltsfelagið FC Barcelona hevur gjørt eina risaavtalu við fyritøkuna Nike. Avtalan er galdandi fram til 2013, og hesi árini skal Barcelona spæla í klæðum frá Nike. Sambært spanska blaðnum Marca er avtalan verd 1,1 milliard krónur, og hesa upphædd fær Barcelona at ráða yvir næstu seks árini.

KÍF-H71 30-30 (14-13):

# KÍF misti møguleikan

**KÍF líktist einum vinnara ímóti endanum av dystinum ímóti H71 í Atlantic Airways-kappingini, men síðstu løtuna svaraði H71 aftur og tryggjaði sær javnleikin. Ein javnleikur, sum kostaði KÍF finalumøguleikan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*KÍF førdi trygt síðstu løtuna av dystinum, men H71 kom væl aftur og fekk bjarga sær javnleikin. Við hesum misti KÍF møguleikan at koma í FM-finaluna.*

Setningurin hjá KÍF var púra greiður undan dystinum í Atlantic Airways kappingini sunnudagin. Ein sigur var krav í heimadystinum ímóti H71, um kollfirðingarnir skuldu halda fast í vónini um at koma í finaluna. H71 hevði ikki tað heilt stóra at spæla um henda dagin, men teir hava tó víst fyrr í ár, at teir er førir fyri at steðga kollfirðingum.

### Lítil munur undan steðginum

H71 gav KÍF ein ordans hvøkk mest sum alt fyri eitt, tí teir byrjaðu nevniliga dystin sum eitt satt ódnarveður. Liðini vóru ikki meir enn komin í gongd, so hevði H71 vunnið sær ein trý mála leiðslu, og teir spældu eisini sera væl fyrstu løtuna. Teir spældu skjótan hondbólt, og hetta tóktist at geva kollfirðingum ávísar trupulleikar.

So við og við fótaði KÍF sær tó, og løtu seinni høvdu teir fingið samband við gestirnar, og so gekk javnt á næstu løtuna. Liðini skiftust um at skjóta mál, og munurin var at kalla eingin. Móti endanum av hálvleikinum megnaði KÍF tó at vinna sær eina tvey mála leiðslu, men hetta var ikki endiliga orsakað av góðum spæli. H71 brendi nevnliga tríggjar opnar møguleikar hesa løtuna.

### KÍF hevði møguleikan

Dysturin gjørdist heldur frægari eftir steðgin. Leikferðin var væl hægri í seinna hálvleiki, og liðini vístu seg at spæla heldur betri.

Tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn H71 hevði fingið KÍF aftur, og so fylgdust liðini til miðskeiðis í hálvleikinum, men so tók KÍF eitt ordans hál. Hoyvikingarnir vórðu raktir av eini dupultari útvísing, og KÍF takkaði fyri møguleikan at spæla seks ímóti fýra.

H71 megnaði at minka niður í tvey mál, men enn einaferð blivu teir raktir av tveimum útvísingum innan stutta tíð, og enn einaferð blivu teir revsaðir av kollfirðing num, sum nýttu møguleikan til at leggja seg á odda við fýra málum. Við seks minuttum eftir á talvuni tóktist alt avgjørt, men hoy´vikingar vildu tað tó øðrvísi.

Stutt undan leikloki var rakt av eini útvísing, og hesar tveir minuttirnar nýtti H71 til fulnar. Teir komu uppá javnt, og so var lagt upp til ein spennandi enda í Kollafirði. Her megnaði Damir Oros at leggja KÍF á odda við brotskasti í seinasta minuttinum, og so fór H71 í seinasta álopið. Teir spældu bóltin runt í eina løtu, áðrenn Gunnar Bláerg bleiv spældur leysur á strikuni. Hann sendi bóltin í málið, og so endaði dysturin í Kollafirði við javnleiki.

Við javnleikin hevur KÍF mist møguleikan at koma í finaluna, og nú er greitt, at henda verður ímillum VÍF og Kyndil.

## FAKTA

**KÍF-H71 30-30 (14-13)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Damir Oros 10 (3), Daniel Rapa 6, Ingi Johannesen 6, Teitur Joensen 4, Rógvi Weyhe 2, Eddie Joensen 2
**H71:** Dánjal Tórgarð 8, Esbern Patursson 7 (2), Gunnar Bláberg 7, Niels Viggo Niclassen 4, Heini Bendtsen 2, Janus Sørensen 2
**Brotskøst:** KÍF 3, H71 2
**Útvísingar:** KÍF 3, H71 5
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

Dráttur-KÍF 3-0 (25-20, 25-13, 25-21)

## Dráttur fekk bronsuna

**Dráttur vann ein tryggan sigur á KÍF i meistaradeildini hjá kvinnum sunnudagin, og við sigrinum hava tær nú tryggjað sær bronsuheiðursmerkini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

KÍF hevði ein lítlan møguleika at fáa Drátt aftur undan dystinu í vikuskiftinum, tá hesi bæði liðini hittust á Giljanesi. Dráttur vildi tó ikki geva KÍF nakran møguleika at vinna triðja plássið frá teimum, tí tær vunnu nevniliga ein sannførandi 3-0 sigur.

Í fyrsta setti var KÍF hampiliga væl við, men sigurin hjá Drátti var sum so ongantíð í vanda. Tær vunnu 25-20, og so vóru tær komnar í gongd.

Í øðrum setti var slett eingin ivi. Her legði Dráttur seg trygt á odda mest sum alt fyri eitt, og munurin bleiv bara størri og størri ímillum liðini. KÍF fekk slett ikki fótin fyri seg í hesum settinum, og at enda vann Dráttur ein knúsandi 25-13 sigur, og so stóð 2-0.

Í triðja setti var KÍF aftur væl betri við. Tær royndu at hanga í Drátti, men at gjørdust vágakvinnurnar ov drúgvar. Dráttur vann nevniliga triðja sett 25-21, og við sigrinum hava tær nú tryggja sær bronsuheiðursmerkini.